# Skála kom á talvuna

Skála, sum í fjør flutti niður úr Formula-deildini, vann sær mikukvøldið sítt fyrsta stig í 1. deild. Skála spældi á heimavølli móti Víkingi, og tann dysturin endaði við javnleiki 1-1. Tveir aðrir dystir í 1. deild vórðu spældir týskvøldið. Á Sandi vann B71 2-0 móti MB, og í Havn vann HB 2-1 móti B68.

# Hamburg vann í Bremen

Fyrru hálvfinalurnar í seinastu UEFA Cup kappingini vóru spældar í gjárkvøldið. Í Kiev endaði dysturin millum ukrainsku liðini, Dynamo Kiev og Shaktar Donetsk við einum 1-1 javnleiki, sum gevur Shaktar ein fyrimun til returdystin. Luis Fernadinho skoraði fyri Shaktar, meðan málið hjá Kiev var eitt sjálvmál. Í Bremen møttust Werder Bremen og Hamburger SV. Hamburg vann dystin 1-0 við einum máli, sum fall í 28. minutti. Guy Demel sendi eina góða sending inn til Piotr Trochowski, sum í einari fríari støðu skoraði hegnisliga til 1-0, sum gjørdist sigursmálið.



*Um vikuskiftið verður stóri endabresturin hjá Fimleikinum, tá føroyameistararnir í estetiskum fimleiki skulu finnast*

# Estetiskur endabrestur

**Komandi vikuskiftið verður ítróttarhøllin á Hálsi karmur um Føroya meistarakapp ingarnar og B-kappingina í estetiskum fimleiki**

FIMLEIKUR
*Tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*

Her fara 24 lið at luttaka í kappingunum í estetiskum fimleiki, og er hetta á fyrsta sinni so stór tilmelding hevur verið, tað frøist fimleikasambandið um, sum roynir at gera karmarnar so góðar sum vítt gjørligt, og í tráð við altjóða kappingar, sum vit slett ikki liggja aftanfyri.

Feløgini, sum luttaka, verða Klaksvíkar Fimleikafelag, Flog úr Fuglafirði, Støkk av Glyvrum, Havnar Fimleikafelag og Ljósið úr Havn.

Spenningurin er sera stórur, kappingarnar eru harðar millum nøkur lið, tey eru sera jøvn, her eru smáir marginalar millum liðini.

Fimleikasambandið hevur skipað fyri tveimum steypakappingum í ár. Tær verða lagdar runt um í landinum ella har, sum feløg íðka estetiskan fimleik og kunnu verða við í kappingunum, og har vit kunnu verða við til at lýsa stóra krevjandi arbeiðið hjá fimleikarum og venjara.

Estetiskur fimleikur er komin fyri at verða. Luttakararnir gera stóra framgongd, men tó skal sigast, at tað liggur sera hart arbeiði aftanfyri. Tað er ikki lætt at verða á hesum úttøkuliðum, tað krevur sera nógv af fimleikarunum og annars familjuni rundan um teir, teir íðka so at siga hvønn dag, og venjingin er sera hørð. Eisini venjararnar og dómararnar gera eitt sera stórt arbeiði fyri at fylgja teimum altjóða reglugerðunum, sum kappingarnar verða dømdar eftir.

Kappingin byrjar leygardagin kl. 13.30 við B-kappingin, til hesa kapping eru lið, sum ikki ynskja at luttaka í føroyameistarakappingini, og um feløgini hava fleiri enn 1 lið í hvørjum bólki. Tað er bara loyvt einum liði frá hvørjum felag at luttaka í hvørjum bólki í føroyameistarakappingini.

Síðani verður ein lítil steðgur til føroyameistarakappingin fyri unglingar og kvinnur byrjar kl. 17.00.

Sunnudagin klokkan 16 halda kappingarnar fram, tá yngru liðini kappst.

Raðfylgjan fyri kappingarnar verður báðar dagar trekt eftir venjingartíðirnar.

Dómarar til hesar kappingar eru úr flest øllum feløgum, tó vanta dómarar úr Fuglafirði og Klaksvík, sum eru við á fyrsta sinni. Men vónin er, at tey eisini fara at finna eitt evni til dómaratruppin. Tað er FFS, sum skal skipa soleiðis fyri, at dómararnir fáa útbúgvingina, so tað er bara at halda seg til. Dómararnir verða í trimum bólkum, helst fýra dómarar í hvørjum bólki. Tær døma eftir altjóða reglugerðum, fyri teknisk, fyri framførðslu og fyri tað listarliga, og liðini verða dømd eftir tí tey framføra á gólvinum.

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 NSÍ | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 11 | 6 | 5 | 10 |
| 2 HB | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 7 | 4 | 3 | 9 |
| 3 B36 | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 8 | 7 | 1 | 9 |
| 4 Víkingur | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 11 | 6 | 5 | 7 |
| 5 EB/S | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 8 | 6 | 2 | 6 |
| 6 AB | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 5 | 4 | 1 | 6 |
| 7 ÍF | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 4 | 8 | -4 | 3 |
| 8 B68 | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 4 | 9 | -5 | 3 |
| 9 07 Vestur | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 8 | 14 | -6 | 3 |
| 10 KÍ | 4 | 0 | - | 2 | - | 2 | 3 | 5 | -2 | 2 |

| 1. deild menn | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 11 | 7 | 4 | 9 |
| 2 B68 | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 11 | 7 | 4 | 9 |
| 3 VB/S | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 11 | 7 | 4 | 9 |
| 4 B71 | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 10 | 6 | 4 | 9 |
| 5 FC Hoyvík | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 7 | 4 | 3 | 9 |
| 6 TB | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 9 | 7 | 2 | 9 |
| 7 NSÍ | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 8 | 12 | -4 | 6 |
| 8 Víkingur | 5 | 1 | - | 2 | - | 2 | 3 | 4 | -1 | 5 |
| 9 Skála | 5 | 0 | - | 1 | - | 4 | 4 | 10 | -6 | 1 |
| 10 MB | 5 | 0 | - | 1 | - | 4 | 4 | 14 | -10 | 1 |



# Rannvá *og* Lennart

Í blaðnum mikudagin komu vit av óvart at taka ov nógv av einari mynd til greinina, sum var um føroyska skjúttan, Rannvá Eiriksdóttir. Í myndatekstinum var víst til álendska sjeikin hjá henni, Lennart Åkerblom, sum hon skal giftast við í summar, men hann sást tíverri ikki á myndini. Vit biðja orsaka og koma her við einari betur skornari útgávu av myndini, har tey bæði síggjast, tá tey í heyst vóru heima í Føroyum og vitjaðu. Myndin er tikin undir Veðrakappingini, sum var á skjótibreytini í Sundalagnum.

## FAKTA

Í B-kappingin kappast hesi lið í hvørjum bólki sær:
Pinkur frá Havnar Fimleikafelag, Støkk, Flog og Klaksvíkar Fimleikafelag.
Smágentur frá Havnar Fimleikafelag og Flog
Gentur frá Havnar Fimleikafelag og Støkk.

Í kvinnuunglingum kappast hesi lið:
Havnar fimleikafelag, Ljósið og Støkk
Síðani kappast kvinnurnar sum eru frá:
Havnar fimleikafelag, Ljósinum og Flog.

Hjá yngru liðunum kappast:
Pinkur, frá Ljósinum, Havnar fimleikafelag og Støkk. Síðani verður kappingin fyri smágentur frá somu feløgum og í kappingini fyri gentur luttaka eisini fimleikarar úr Ljósinum, Havnar fimleikafelag og Støkk.

vodafone deildin